jek@fmr.fo

**Fíggjarmálaráðið**

**Kvíggjartún 1**

**160 Argir**

**Hoyringssvar til løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn (Betrað brøkpensjón, frítøka, gjøld og panting)**

Gott og neyðugt at betrað verður um brøkpensjónina/útgjaldið, sum fæst úr samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum (AMEG). Tikið verður undir við, at brøkpensjónin hjá AMEG verður betra broytt og betra úr 1/40 upp í 1/15 fyri hvørt ár, ein persónur hevur búð í Føroyum, frá tí at viðkomandi hevur búðí í Føroyum frá tí , at viðkomandi var 15 til ein er 67 ár.

Tað er tó ikki nøktandi, at tað í uppskotinum einans verður mælt til at broyta og betra útgjaldið í framtíðini. Løgtingslóg um AMEG má somuleiðis broytast, soleiðis at tey, ið hava verið fyri mismuni orsakað av lógarfeili, sum kom í lóg um AMEG við løgtingslóg nr. 36 frá 28. apríl 2009, tá tað við lóg varð samtykt, at persónar skulu hava búð í Føroyum í 40 ár, meðan ein var millum 15 og 67 ára gamal. Hesin lógarfeilur/lógáseting skerdi rættin hjá nógvum pensjónistum, sum høvdu fastan bústað í Føroyum, at fáa fult útgjald frá AMEG.

Teir persónar, ið hava verið fyri órætti orsakað av hesum lógarfeili frá 2009, eiga at fáa júst sama útgjald, sum onnur, ið hava havt fastan bústað í Føroyum síðan 1991, tá tað við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 varð ásett, at persónar og arbeiðsgevarar skuldu byrja at gjalda inn í "Samhaldsfasta" arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

Tískil verður heitt á Fíggjarmálaráðið/løgtingið at broyta løgtingslóg um "Samhaldsfasta" soleiðis at tey, ið hava verið fyri mismuni orsakað av nevnda lógarfeili, umsíður fáa útgjald frá AMEG, sum tey av røttum eiga at fáa, hetta við afturvirkandi kraft.

Løgfrøðisliga er ongin forðing fyri at løgtingið kann samtykkja lóg, ið gagnar einum bólki av borgarum.

Mælt verður tí til, at nýtt stk. 3 verður sett í § 3 í lóg um AMEG. Broyting av lóg um AMEG, ið rættar upp tann mismun, sum uml. 200-300 pensjónistar hava verið fyri síðan 1. juli 2009.

Mælt verður til niðanfyri standandi nýtt stk. 3 verður sett í § 3, í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

***Tann, sum hevur havt fastan bústað í Føroyum síðan 1. mai 1991, hevur rætt til fult útgjald frá AMEG við afturvirkandi kraft at rokna frá 1. juli 2009. Eftirgjaldið frá AMEG verður útgoldið eftir umsókn.***

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um "Samhaldsfasta" varð ásett, at allir persónar við føstum bústaði í Føroyum og arbeiðsgevarar skulu rinda ávíst gjald til "Samhaldsfasta" arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

Vit halda, at **øll** tey, sum hava goldið inn í "Samhaldsfasta" síðan byrjað varð at gjalda inn í AMEG í 1991 sambært løgtingslóg um "Samhaldsfasta" eisini høvdu rætt til at fáa fult útgjald úr AMEG, tá tey gjørdust 67 ár. Tískil eigur eftirlønin/AMEG-útgjaldið hjá persónum, sum hava havt fastan bústað í Føroyum síðan 1991, tá lóg um inngjald til AMEG varð samtykt og sett í verk - og sum tískil hava verið fyri mismuni síðan 2009, at fáa AMEG-útgjald sítt eftirregulerað við afturvirkandi kraft.

Fáa hesir persónar eftirgjald frá AMEG, fær hetta positivt árin á landskassan. Eftirgjaldið frá "Samhaldsfasta" verður at gjalda úr AMEG grunninum og ikki úr landskassanum. Tey, ið fáa eftirgjald frá AMEG, skulu gjalda skatt av útgoldnu upphædd. Harvið vildu bæði landskassin og kommunurnar fingið fleiri inntøkur.

Í sambandi við at hetta lógaruppskot um broyting í løgtingslóg um AMEG (betrað brøkpensjón, frítøka, gjøld og panting) verður lagt fyri løgtingið, verður heitt á Fíggjarnevndina, at umboð fyri undirritaðu verða innkallað til hoyringsfund saman við Fíggjarnevndini.

Tórshavn, hin 22. november 2018

Vegna bólkin

Bozena Rasmussen

Gamli Vegur 4

188 Hoyvík